# West Navion roynir eydnuna í grannalagnum

Føroyskt útgerðar-skip fylgir við

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Tá umboð fyri BP vóru í Oljumálastýrinum við umsóknini*

Leygardagin var riggað endaliga av í Svínoyarbrunninum og West Navion setti kósin móti Assyntøkinum at bora ein nýggjan brunn fyri BP og Shell. Assyntbrunnurin, sum ligur beint hinumegin markið í bretskum øki, liggur umleið 2 tíma siglingartíð frá Svínoyarbrunninum. Við umborð eru tann útgerðir, sum skal brúkast í byrjanini av hesi boringini, ið er mett at taka eina tveir mánaðir. Útgerðin kom til Runavíkar herfyri og varð skipað umborð á West Navion, meðan hann arbeiddi á føroyska landgrunninum. Í løtuni eru samráðingar millum BP og myndugleikarnir í Runavík um antin boriskipið skal fáa sínar tænastur úr Skotlandi ella úr Føroyum. Tað er eingin loyna, at BP fyrr hevur víst á, at að vil fegið brúka eina føroyska útgerðarhavn er hon kappingafør heldur enn at b rúka skotskar havnir, nú brunnurin liggur so tætt upp at markinum.

Men tað er óvist hvussu verður við hesum, tí ymisk gjøld her eru dýrari enn í skotskum havnum skilur blaðið. Í løtuni tingast umboð fyri Ruanvíkar havn og BP um málið. Annars er tann ein sannroynd, at føroyskar vørur og tænastur longu hava prógvað, at tær eru kappingarførar. Við West Navion inn á bretskt øki at bora er nevniliga Faroe Connetcor hjá Tor Esvagt í Hósvík. BP hevur gjørt sáttmála við føroyska reiðaríið at liggja hjá boriskipinum næstu mánaðirnar eisini.

Sosialurin skilur, at henda fyrsta føroyska royndin at gera út skip við føroyskari manning og við herimstaði í Føroyum til at veita tænastur til oljuboriskip hevur eydnast sera væl. BP hevur rættiliga stórar vónir til brunnin, sum nú verður boraður skamt frá markinum. Verður fund gjørt kann tá fáa týdning fyri komandi virksemi á føroyska økinum eisini.



*Faore Connector fylgir við boriskipi yvir í bretskt øki*

# Í Býin




fríggjakvøldið 12/10 DRAGSHOW
Fyri fyrstu ferð í Føroyum
Konufólk ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
Nógv góð tilboð í samband við undirhaldið
DJ Havgrím
Gestabarrvørar TV3
Nikolaj & Richardn úr BARREN
leygarkvøldið 13/10 DJ Ottar
Gestabarrvørar TV3
Nikolaj & Richardn úr BARREN
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque
petur & petur • 320870

AUTO
-Dag sum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
Skal tú bil hýra
-so er tað 311234
AUTO
311234

Í Býin
- hvønn hósdag



ASSU

